

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 03 - 2012

# Magni Arge klipti Airbus snórin

Fyri løtu síðani varð nýggja Airbus flogfarið latið Atlantic Airways. Hetta hendi á samkomu í Hamburg, har umleið 100 umboð úr Føroyum vóru til steðar. Tað var Magni Arge, stjóri í føroyska flogfelagnum, sum tók ímóti hesum nýggjasta farinum og kilpti snórin. Kaj Leo Johannessen bar fram røðu og rósti føroyska flogfelagnum fyri at hava gingið undan og tikið avgerðina at nútímansgera føroyska flogferðslu. Oljan.fo fekk fyri løtu síðani orðið á Johan Dahl, vinnumálaráðharra í telefonini úr Hamburg. Hann fegnast um henda nýggjasta varðan í føroyskari flogsøgu, fyri ikki at siga føroykari søgu sum heild. Johan Dahl dylur heldur ikki yvir, at eisini tá talan er um føroyska vinnumenning og at kunna knýta betri og størri sambond úteftir eitt nú til olju- og frálandaverðina hevur henda útbygging hjá føroyska flogfelagnum týdning. Somuleiðis fegnast hann um, at Atlantsflog herfyri fekk tillutað sáttmálan við Statoil at standa fyri flutninginum av borifólki millum Vágar og boripallin, sum kemur til Føroya í summar. Vit eiga at síggja henda sáttmálan, nýggja flogfarið og tær útbyggingar, sum eru og verða gjørdar í Vágum sum eina týðandi betran av grundarlagnum fyri komandi føroyskum oljuvirksemi bæði her heima og burturi. Eg síggi nýggja Airbussin sum eitt týðandi lið í hesi vinnumenningini.